Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Eyðdis Hartman Niclasen, landsstýriskvinna í heilsu- og orkumálum

Evni: Burturbeining av elbilum

Spurningar:

1. Er ein loysn funnin fyri, hvussu elbilar skulu burturbeinast í Føroyum?
2. Hvussu nógvir elbilar eru burturbeindir, frá tí at teir komu til Føroyar og til í dag?
3. Hvør er kostnaðurin av at burturbeina ein elbil, og hvør ber kostnaðin av hesum?
4. Kunnu burturbeiningarstøðirnar seta krøv til, hvussu elbilar skulu latast inn til burturbeining, t.d at bilur og battarí eru skild sundur, áðrenn elbilurin verður latin inn?

Viðmerkingar:
Tað koma alsamt fleiri elbilar á vegirnar í Føroyum. Sambært tølum hjá Akstovuni frá 1. juni 2026 vóru 3.119 elbilar skrásettir av tilsamans 28.411 persónbilum, sum er umleið 11% av persónbilunum í Føroyum.

Elbilarnir skulu eins og aðrir bilar fyrr ella seinni burturbeinast og/ella endurnýtast. Nakrir fáir elbilar eru farnir í skrell, tí teir eru blivnir vrak, men teir fyrstu árgangirnir av elbilum hava koyrt somikið leingi, at hugsast kann, at talið av elbilum, sum skulu burtbeinast, fer at økjast munandi komandi árini.

Tað tykist ikki vera funnin ein loysn fyri, hvussu burturbeiningin skal fara fram á ein skynsaman hátt. Her verður serliga hugsað um fíggjarliga partin. Tað ljóðar, at tað kostar meira at burturbeina ein elbil samanborið við aðrar bilar orsakað av stóra battarínum, sum situr í bilinum, og fyri bileigaran kann tað gerast kostnaðarmikið, um kravt verður, at bilur og battarí skulu skiljast sundur, áðrenn bilurin verður burturbeindur.

Á Løgtingi, 18. juni 2026

Steffan Klein Poulsen